
Nakrir av manningini á "Tinganes" f.v.: Alex Hansen, Tórshavn, Magnus Fugløy, Klaksvík, Virgar Poulsen, Tórshavn, Amariel Norðoy, Klaksvík, Jonhard Poulsen, Klaksvík, og Christian Lydersen, Klaksvík. Sitandi frammanfyri f.v.: Solberg Fornagarð, Fuglafjørður, og Julius Løkságarð, Klaksvík. Myndin er tikin í 1960.



"Tinganes" í Fiskemesterens Havn

tóku myndir, so var farið út til "Brimoynna", har vit ofta høvdu fiskað. Vit royndu at koyra snelluna niður, men har var steindeytt. Málað á steinar og klettar

Har sást ikki eitt fuglabein, tað var steinoyði. So varð farið til "Grýluvíkina", har var eisini steindeytt, so varð siglt til "Vatnhavnina", tað tók einar 40 min. at sigla. Tá vit komu inn í "Vatnhavnina", fóru vit at leita eftir nøvnunum, sum skipsmanningar høvdu málað á steinar og klettar. Vit kunnu siga tað soleiðis, at fleiri av skipanøvnunum vóru líka klár, sum um tey vóru málað í gjárkvøldið. "Sjálvur sigldi eg fleiri ár við Tinganesi, vit høvdu málað navnið á ein klett, tað var so púra klárt", sigur Magnus Fuglø.

So var farið víðari gjøgnum Tunafjørðin. Tað var har, sum Tinganes sakk í 1963, tann 8. september kl. 16.25 grønlendska tíð. Eg minnist tað væl, tí eg var stýrimaður tann túrin. Løgið sum tað er, so var tað dagsdato 43 ár seinni, at vit sigldu í Tunafjørðinum, sigur Magnus Fuglø.

Vit fóru síðan vestur til "Kapphavnina", umvegis kirkjugarðsrúgvuna og kirkjugarðsnesið. Vit komu so inn í "Kapphavnina", men tá var vindurin vorðin so nógvur, at ikki slapst í land, so vit tóku myndir av støðunum, har føroyingarnir høvdu húsast. Føroyingar sum høvdu róið høvdu ró út har fyrst í 60 árunum.

Vit sóu eisini ein stórhval, sum lá og spældi sær á víkini, hann var deyðaspakur, so vit tóku nakrar myndir av honum. Grønlendarin, sum førdi bátin, helt, at nú var túrurin liðugur, og myrkur fór at koma á okkum. Nógvur ísur og vindur var, so fóru til bygdina Appiladok og lógu har fyri náttina.

Næsta morgun var farið norður til Nanortalik. Vit vóru har um middagin leygardagin. Vit høvdu tá siglt 210 fjórðingar í 30 tímar.

Kl. 10 sunnumorgun var farið í kirkju, tað vísti seg eisini at vera barnadópur. Tað var sera hugnaligt. Tað er ein fastur siður, at tá kirkjugangurin er liðugur, koma mammurnar við børnunum út á trappuna. Har stillaðu tær seg upp til myndatøku. Tað tók einar 10 minuttir. Har bleiv filmað og blitsa úr øllum ættum.

Aftaná døgurðan fóru vit á eitt savn - teir høvdu eitt væl útbygt savn. Har sóu vit konubátar, kajakkir og annað, sum teir høvdu lívbjargað sær við. Annars vóru fleiri smá hús, sum savnslutir vóru í. Um kvøldið kom ferðaleiðarin á hotellið og segði, at vit skuldu flúgva kl. 10 næsta morgun, so vit skuldu koma á skrivstovuna kl. 9 og avrokna.




## Vitjaðu í Brøttulíð

Næsta morgun varð flogið til Narsarsuak umvegis Julianehåb. Vit tosaðu um at gera ein túr yvir á Brøttulið at hyggja eftir víkingaútgrevstri. Har hevði verið eitt stórt minningarhald í 2000. Har var gjørt nógv burturúr. Vit tosaðu við ein fransmann, sum hevði fingist við ferðafólkasigling í nógv ár har, um at sigla okkum yvir um fjørðin. Tað var gamaní. Morgunin eftir kl. 10 var farið avstað, tað tók hálvan tíma at sigla yvir um fjørðin har Brattalíð var. Tá vit nærkaðust bryggjuni, hoyrdu vit nógvan gang. Tað var ungdómurin í bygdini, sum stóð við fløggum og veittraðu. Eg segði við Jógvan Weihe, at tað er vorin sum móttøka vit fáa. Tað vísti seg, at ein speedbátur var komin at bryggjuni, og umborð var ein drongur úr bygdini, sum var blivin grønlandsmeistari í trimum ítróttargreinunum. Sjálvandi heilsaðu vit eisini upp á hann. Síðan var farið út í Brøttulíð, har sat ein ferðaleiðari og bíðaði eftir okkum.

Á einum kletti stóð ein stór standmynd av Eiriki Reyða. Tað var ógvuliga áhugavert at hoyra hesa ungu damuna greiða frá, hvussu víkingarnir høvdu búleikast har (hon dugdi væl at tosa føroyskt, hevði bert einaferð verið í Føroyum). Annars skuldu vit sigla yvirumaftur kl. 12. Vit skuldu flúgva kl. 18 til Íslands og yvirnátta har. Seint um kvøldið til Reykjavíkar og búðu á Sjómansheiminum Ørkini.

Næsta morgun fóru vit til Bláa Lónið, har høvdu vit ongantíð verið áður. Kl. 18 bleiv so flogið heimaftur til Føroyuar eftir ein ógloymandi túr, sigur Magnus Fuglø.




Tunafjørður. Her sakk Tinganes í 1963



Skipsmanningarnar høvdu málað á steinar og klettar.Vit síggja nøvn sum t.d. Columbus og Tinganes